Tjóðskjalasavnið

# Orðalisti

*Hent orð í sambandi við journalisering, málsviðgerð og avhending.*

### Journal

Protokol, leysbløð ella kartotek til skráseting av innkomnum skrivum umframt avgerðum og svarum, ið standast av innkomnu skrivunum. Orðið verður tó eisini nýtt í øðrum samanhangi, eitt nú um tað staðið, har sjálv skrásetingin (journaliseringin) fer fram og har sum journalin verður goymd. Vit kenna jú eisini journal í øðrum høpi, t.d. sjúklingajournal.

### Journalætlan

Ein journalætlan er yvirlit yvir hvørji evni finnast í málum í einum skjalasavni. Evnini verða eisini nevnd málbólkar og eru tey sett í nummarrøð. Mál, ið viðgera serstakt evni ella eru um sama evni, fáa tí sama nummar. Saman við árstali og raðnummari verður málbólkatalið til eitt journalnummar.

### Journalvegleiðing

Ein journalvegleiðing er ein vegleiðing í framferðarhátti í sambandi við journalisering og lýsir mannagongdir og arbeiðshættir frá mál verður til, til hetta verður lagt á goymslu.

### Mál

Eitt mál vil oftast verða sett saman av pappírum, sum liggja í felags umslagi. Í nýggjum teldutøkum journal- og málshandfaringarskipanum eru málseindinar (brøv, teldubrøv, ljóslesingar o.a.) bert knýttar saman elektroniskt.

Eitt pappírsmál kann tó eisini verða so stórt, at tað fyllir fleiri ringbind, mappur ella eskjur.

Sum dømi um mál kunnu nevnast journalmál, starvsfólkamál, byggimál o.s.fr.

### Málsyvirlit

Eitt málsyvirlit er yvirlit yvir mál sum hvør sær mangan innihalda

- Eitt serstakt nummar, sum eyðmerkir málið
- Navnið á málinum
- Dagfesting fyri nær málið byrjar
- Dagfesting fyri nær málið endar

### Málbólkar

Sí journalætlan

**Myndugleiki**
Sjálvstøðugu fyrisitingarligu eindirnar, ið eru umfataðar av savnslógini, nevnast myndugleikar. Tjóðskjalasavnið nýtir somu allýsing sum hana, ið framgongur av løgtingslóg um fyrisitingarlóg og lóg um innlit í fyrisitingina.

Sum dømi kunnu nevnast ráð, nevndir, stovnar, prestagjøld, bispadømi, Føroya rættur, Fútin o.s.fr**.**

**Leitiamboð**
Skrásetingarskipanir kunnu nýtast sum leitiamboð. Sum dømi um hetta kunnu nevnast kartotek, navnaskráir, postlistar, kopibøkur, brævaskráir, málsyvirlit o.s.fr

**Savnsskjøl**
Heitið savnsskjøl fevnir um skrivligt tilfar eins og øll onnur sløg av tilfari, sum gevur upplýsing og er vorðið til ella fingið til vega í sambandi við tænastuvirkið hjá stovninum og hjá starvsfólki hansara.

Mál eru eitt nú brøv, notat, frágreiðingar o.l., ið eru skipað í samanhangandi eindir, ið viðvíkja einum serstøkum evni. Vanliga er talan um pappír, men tó kann talan eisini vera um t.d. kort, tekningar og ætlanir, ljósmyndir, filmar og smáfilmar, ljómfløgur, ljóðbond, holkort, magnetbond, disklar og aðrar miðlar til at viðgera og goyma upplýsingar.

Søvn við útgivnum (publiseraðum) tilfari, t.d. bøkur, tíðarrit, bóklingar o.l., eru ikki at meta sum savnsskjøl.

**Skjalasavnseindir**
Savn av savnsskjølum, sum tá tey eru vorðin til, eru goymd sum ein serstøk eind. T.d. kopibøkur hjá X, journalir hjá Y, málssavnið hjá Z o.s.fr. Leitiamboð til skjalasavnseindir eru somuleiðis at meta sum skjalasavnseindir, t.d. vísdómsbøkur, journalregistar til journalir o.s.fr.

**Savnsskapari**
Savnsskapari er tann myndugleikin, sum, tá savnsskjølini vórðu til, hevði ábyrgdina fyri teimum skjalasavnseindunum, sum savnsskjølini verða samlaði í.

**Skrásetingarskipan**
Myndugleikar skulu helst skráseta innihaldið av skjalasavni sínum í eini skrásetingarskipan. Skrásetingarskipanin kann tí nýtast til at finna upplýsingar í skjalasavninum. Skrásetingarskipanin vil sum oftast hava upplýsingar um hvørji mál finnast í savninum. Er talan um journalmálsskjalasavn, so inniheldur skrásetingarskipanin eisini upplýsingar um innhaldið í einstøku málunum.

Sum dømi kunnu nevnast journalir, journalkort, edv-journalir, dáturgrunnar, málsyvirlit o.s.fr.

Tjóðskjalasavnið

## Vraking

Vraking merkir úttøka av savnsskjølum, ið ikki skulu goymast. Myndugleiki má tó ikki vraka nakað savnsskjøl uttan at hava fingið loyvi til tess frá Tjóðskjalasavninum. Vrakingarloyvi byggja oftast á journalskrásetingar og mugu vera skriftlig. Tá skriftligt loyvi fyriliggur kann myndugleiki vraka savnsskjøl.